# Endaðu listastevnu á útoyggj

LISTASTEVNA
*Jan Müller*



*Írar bergtóku í Norðurlandahúsinum*

*Mynd Jan Müller*

Listastevnan 2003 fekk ein sera kensluligan og vakran enda. Tað syrgdu 24 írskir amatørsjónleikarar fyri. Har vóru børn, ung og tilkomin, sum dansaðu, sungu og spældu sjónleik fyri teimum umleið 300 áskoðarunum í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið. Eitt frálíkt punktum – finala – í eini annars fjølbroyttari og livandi listastevnu.

Hevði henda sýningin, ið nevndist »Oileán«, fingið størri umrøðu frammanundan er lítið at ivast í, at Norðurlandahúsið hevði verið fullsett. Tað var ikki bara ein vakur og fjølbroyttur leikur við øllum tí, ið krevst fyri at fáa kenslurnar í kók, tað var eisini ein leikur við søguligum innihaldi, sum fekk heimligar klokkur at ringja. Evnið var nevniliga lívið í útoyggj, hvussu stríðið var fyri at yvirliva og hvussu fólkið á Great Blasket Island í Írlandi livdi fyri meira enn 50 árum síðani, til oyggin bráddliga gjørdist manntóm. Tað vekir tankar og kenslur um, hvussu verður á útoyggj í Føroyum í framtíðini – um søgan fer at endurtaka seg her eisini!

Tað var írska fólkatjóðleikhúsið »Siamsa Tire«, sum í umleið 2 tímar bergtók føroysku áskoðararnar. Lat tað tó verða sagt beinavegin, at hetta er ikki tað professionella írska tjóðleikhúsið, sum kanska onkur hevði fingið fatan av undan sýningini. Talan er um amatørleikhús, sum kortini ikki smæðist burtur. Tað kundu áskoðararnir eisini vátta, tá teir 24 írarnir bergtóku við sínum sangi og eyðkenda írska dansi og við eini pallmynd og ljósføring, sum fekk tað at síggja sera professionelt út. Vit fara í Sosialinum seinni í vikuni at nema við sjálva søguna í leikinum, eina lagnusøgu, sum eisini er áhugaverd fyri okkara egnu tíð.

Aftaná sýningina í Norðurlandahúsinum var samkoma í Sjónleikarhúsinum, har m.a. høvi varð at hitta írsku leikararnar. Á samkomuni takkaði stjórin í Norðurlandahúsinum og forkvinna í Listastevnustýrinum, Helga Hjórvar øllum, luttakarum, áskoðarum og stigtakarum fyri eina sera góða stevnu og handaði blónutyssi til Oddvu Nattestad, sum hevur verið formaður fyri Listastevnuna 2003. Og síðani handaði hon formansskapin fyri Listastevnuni 2004 víðari til Birgir Kruse.



*Hýrurin var góður á samkomu í Sjónleikarhúsinum, tá Listastevnan endaði*

*Mynd Jan Müller*



*Írsku leikararnir hugnaðu sær óført, tá Listastevnan borðreiddi við føroyskum viðskera og øl frá Vertshúsinum*

*Mynd Jan Müller*



*Nýkomni AFS-arin Steffie úr Sveits var so heppin at vera við til hugnaløtuna í Sjónleikarahúsinum. Her er hon saman við føroysku »mammuni« og einum av írsku leikarunum*

*Mynd Jan Müller*

Eyðun Johannessen, leikstjóri:

# Írskur íblástur

LISTASTEVNAN
*Jan Müller*

Millum áskoðararnar í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið, tá írar vóru á pallinum, var eisini føroyski leikstjórin Eyðun Johannessen. Hvat fekk hann burtur úr leikinum og annars stevnuni sum so!

– Tú kendi mentalitetin og stemningarnar, ja ta spontanu og einføldu gleðina aftur gjøgnum náttúruupplivili og sang í hesum írska leikinum. Tað, sum gav nakað eyka, var at kunna síggja, hvussu írar íðka amatørsjónleik, nakað, sum kanska kundi givið okkum inspiratión. Sjónleikurin í syðra partinum av Írlandi hevur jú ment seg til at vera eitt slag av sosialum arbeiði fyri ung og eisini innan fyri aðrar listagreinir so sum tónleik, dans og rørlur í heila tikið og so eisini drama. Har amatørleikurin hjá okkum meira fokuserar bara uppá sjónleikin sum so. So eg skilji, at hetta er ein máti at arbeiða við ungdóminum eisini sosialt.

Eyðun Johannessen heldur, at hetta er nakað, sum vit eisini áttu at umhugsað. Tí er slík listastevna umframt upplivingarnar eisini ein íblástur fyri mong av okkum.

Írski leikurin er so eisini eitt dømi um, hvussu man roynir at sameina professionalismu og amatørarbeiði. Tað hava so verið sera professionell fólk sum vegleiðandi konsolentar ella instruktørar, koreografar og útbúnir tónleikar sum íblástur til slíkan leik.

Eyðun Johannessen heldur tað eisini vera eitt fínt tema at kunna vísa á slíka sameining á eini listastevnu. Hann vísir annars á, at møguliga hevur presentatiónin av hesum írska tiltakinum verið eitt sindur misvísandi, tí nógv hava hildið, at hetta var tað írska tjóðleikhúsið, tí tey hava eitt heiti, sum líkist tí. Men tað er villeiðandi. Hetta eru amatørar í orðsins bestu merking.

Føroyski leikhússtjórin heldur tað annars vera frálíkt at byrja listastevnuna við nøkrum so toppprofessionellum sum franska sirkussinum hjá Chaplin og so enda við hesum írska leikinum.

Hann heldur tað vera frálíkt, at vit á slíkari listastevnu fáa møguleikan at uppliva ta vektleysu støðuna, sum listin kann bjóða okkum – og at tað ber til.

– Tosað verður um at fáa fleiri kend nøvn til listastevnuna. Pavarotti hevur verið nevndur og onnur við. Hevur tú nakað serligt ynski:

– Tey stóru nøvnini hava ein appell, men tey kosta so tað forslær. Soleiðis sum listastevnan mennist og kann hon blíva ein traditión, so fara kanska eisini tey stóru nøvnini at koma av sær sjálvum.





*Høvdingar hittast beint eftir frumsýningina av Føroyar.dk*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Amatører.fo

**Føroyar.dk er einki minni enn eitt meistaraverk. Filmurin er ein beinrakin lýsing av einum turbulentum tíðarskeiði og gevur eitt gott innlit í føroyska partin av politiska samráðingarspælinum. Men tað er ikki nøkur pen sjón aftur at síggja landsstýrið sum hundur í keyluspæli**

FILMSUMRØÐA
*Rúnar Reistrup*

Annað samráðingarumfar er júst liðugt. Danski forsætisráðharrin og føroyski løgmaðurin koma saman út ígjøgnum hurðina og sessast handan mikrofonirnar hjá pressuni. Forsætisráðharrin pátikið kátur, løgmaður meira samanbitin. Galant tekur danski forsætisráðharrin vatnfløskuna, sum sett er framman fyri løgmann, og letur hana upp fyri hann. Síðan letur hann sína egnu vatnflósku upp og byrjar tíðindafundin.

Triðja samráðingarumfar er júst liðugt. Danski forsætisráðharrin og føroyski løgmaðurin koma saman út ígjøgnum hurðina og sessast handan mikrofonirnar hjá pressuni. Forsætisráðharrin álvarsamur, løgmaður hesaferð enn meira samanbitin enn eftir annað umfar. Teir báðir taka hvør sína vatnflósku og lata hana upp.

Fjórða samráðingarumfar er júst liðugt. Danski forsætisráðharrin kemur einsamallur út ígjøgnum hurðina. Hann er samanbitin. Hann nertir ikki vatnfløskuna, sum sett er framman fyri hann. Síðan sigur hann við pressuna sum er, at samráðingarnar eru slitnaðar, og løgmaður hevur valt at halda sín egna tíðindafund.

Dysturin er av, men vinnarin er hvørki fegin ella stoltur, tí dysturin var ikki millum tveir javnar partar. Men veikari parturin gjørdist desperatur í sínum máttloysi, og tí kundi dysturin bara enda við sorli.

- Tað ber ikki til at samráðast, tí danska stjórnin vil ikki viðurkenna okkum sum javnstøðugar samráðingarpartar, var grundgevingin hjá føroyska landsstýrinum fyri at slíta samráðingarnar.

Men bar tað yvirhøvur til hjá donsku stjórnini at viðurkenna landsstýrið sum javnstøðugan samráðingarpart, tá tað var so ivasamt um føroyska fólkið stóð aftanfyri landsstýrið í hesum málið og partar av sjálvum landsstýrinum vóru so ivasamir í síni egnu søk.

Og var tað yvirhøvur realistiskt at samráðast útfrá lítið lítillátna kravinum um 15 ára treytaleysa skiftistíð eftir eina møguliga avgerð um loysing.

Ella var í veruleikanum talan um grønar politikarar og grønar embætismenn, sjálvir djúpt í politiska sumpinum, sum umframt samráðingarhegni vantaðu skil og virðing fyri grundleggjandi demokratiskum spælireglum og heilt einfalt ikki vistu, hvat teir vóru í gongd við.

Vóru tað veruliga teirgóðu.fo ímóti deonde.dk ella bara amatørar.fo ímóti professionelle.dk.

Hesir spurningar standa eftir, tá seinasti meturin av filminum hjá Ulla Boje Rasmussen er farin framvið ljóskastaranum, og vit aftur verða tikin fram til nútíðina, har búskaparlig og umsitingarlig tillaging til sjálvstýri er nakað man klárar sjálvur, og fólkaatkvøða um loysing er nakað man skrivar út, tá man hevur ein realistiskan møguleika fyri at fremja hana. At filmurin Føroyar.dk reisir slíkar spurningar, heldur enn at fara undir ta ómøguligu uppgávu at svara teimum objektivt, er eitt tekin um stórt eygleiðaraskynsemi. At filmurin megnar at gera eitt so fløkt evni so einfalt uttan at banalisera tað ber prógv um óvanliga gott frásøgusnildi. At filmurin lýsir hetta stríðsfulla tíðarskeið í Føroya søgu í einum anda, sum er lættur av gaman, er ein sýning av, hvussu sterkt eitt vápn skemt er í røttu hondum.

Tí skemtiligur er hesin filmurin sanniliga eisini. Allur salurin flenti í kíki fleiri ferðir undir frumsýningini. Onkuntíð orsakað av, at hendingarnar vóru beinleiðis stuttligar, aðrar tíðir tí tær at onkrari orsøk kendust láturligar sæddar ígjøgnum bakspeglið. Láturin rungaði soleiðis bæði tá filmurin vísti hvussu neyvt Kári Mouritsen pussar sín taxabil undir drotningavitjanini, og tá filmurin vísir Poul Nyrup Rasmussen, við vanligari orðavalseleganssu, sita á tíðindafundi og siga »Forhandlingskursen er ikke hård«, beint eftir at hann hevði bankað føroyska landsstýrið upp í ein krók undir fyrsta samráðingarumfari.

At vit føroyingar nú, fá ár eftir at hálvur hatur og títtar skuldsetingar um landasvik og annað gott fyltu luftina kring sjálvstýrissamráðingarnar, kunnu fáast at flenna meira ella minni hjartaliga eftir nøkrum av tí minni tespiliga, sum fór fram undir samráðingunum, gevur eina góða fatan av hvussu sterkur hesin filmurin hjá Ulla Boje Rasmussen í veruleikanum er.

Hvør hevur til dømis nakrantíð flent at bankamálinum?

Umframt at vera ein eygleiðari av guðs náði og ein frásøgukvinna sum fá, er Ulla Boje Rasmussen eisini ein frálíkur skemtari.

At hon hevur lagt seg sjálva og allar hesar eginleikar í filmin Føroyar.dk eigur hon stórt rós og nógvar føroyskar tøkkir uppibornar fyri. Tí Føroyar.dk verður fyri eftirtíðina ein søguligur dýrgripur, sum gløgt og beinrakið lýsir eina turbulenta tíð í Føroya søgu, og sum kann siga okkum føroyingum ikki so fá álvarsorð, um vit tíma at lurta.

Í filminum er Høgni Hoydal høvuðspersónur. Vit fylgja honum einu løtuna í turkisfarvaða bili hansara og hinu løtuna einsamøllum bíðandi eftir flogrutuni til Danmarkar. Í heila tikið verður myndatólið oftast sløkt, tá sjálvstýrismálaráðharrin fer út úr myndini. Filmurin setir soleiðis tvær strikur undir, at sjálvstýrissamráðingarnar vóru Høgnasa verkætlan. Tað er tí eisini Høgna Hoydal, sum vit fáa samkenslu við, tá hann líkist einum brotnum manni, eftir at løgmaður hevur tikið fólkaatkvøðuna um sjálvstýristilgongdina aftur.

Men hann, ella aðrir føroyingar fyri tann saks skuld, verða ikki útstillaðir sum offur í filminum. Hetta fegnaðist Høgni Hoydal alment um í røðu síni til Ulla Boje Rasmussen beint eftir frumsýningina av filminum, og tað gjørdi restin av føroyingunum í salinum eisini. Tí føroyingar vóru ikki offur, í øllum førum ikki fyri øðrum enn sínum egnu mistøkum og vánaliga samstarvslagi.

Tí væl var Poul Nyrup Rasmussen ein ópassaliga arrogantur statsleiðari og donsku fjølmiðlarnir ein flokkur av ókritiskum nikkidukkum undir sjálvstýrissamráðingunum. Tað vísti filmurin og tað er nú fest á band sum ein staðfesting, ið tænir hesum til lítlan sóma.

Men tað er tann grundleggjandi munurin millum offrið og taparan, at tann seinni sjálvboðin er farin inn í dystin.

Filmurin gevur eitt sjáldsama gott innlit í taktiska politiska spælið - og vísir eitt skúladømi um, hvussu man ber seg at við at tapa hetta spæl. Men filmurin reisir tíbetur ongan peikifingur og gevur soleiðis hvørjum einstakum áskoðara frið at gera sær sína egnu meting av tí, sum fór fram.

Metingarnar verða helst eins nógvar og áskoðararnir.